## Óli rýmdi frá upphitingini

Mitt undir upphitingini hjá føroyska landsliðnum á Celtic Park rýmdi liðformaðurin Óli Johannesen av vøllinum. Hann tóktist halta eitt sindur, tá ið hann fór út til fysioterapeutarnar, og teir settu síðani kós í skiftirúmið. Smáar 10 minuttir seinni kom Óli aftur á vøllin, helt fram við upphitingini og spældi dystin á tamb.

- Eg havi havt eina lítla fiburspreinging í lærinum, og eg var tapaður inn. Tapið sat í so stramt á lærinum, og tí fór vit í skiftirúmið at skifta tapið, greiddi Óli Johannesen frá eftir dystin.




## Malta skoraði tvær ferðir

Malta er ein av smáu europeisku fótbóltstjóðunum, sum Føroyar ofta verða sammettar við. Leygarkvøldið spældi Malta fyri fyrstu ferð í hesi EM undankappingini. Malta átti heimavøll á Ta Qal móti Bosnia Hersegovina.

Tað eydnaðist Malta at skjóta tvey mál - eitt í hvørjum hálvleiki. Men hetta var kortini ikki nóg mikið at fáa stig burturúr við. Bosnia Hersegovina vann 5-2, eftir at liðið av Balkan hevði verið frammanfyri 3-1 í steðginum. Bosnia setti hol á í 4. minutti, men tveir minuttir seinni javnaði Malta. So legði Bosnia seg framum og longu í 51. minutti hevði Bosnia økt til 5-1, áðrenn Malta tríggjar minuttir undan leikloki pyntaði um úrslitið til 2-5.

# Føroyska tapið gav Onglandi íblástur

**Enska landsliðið hitaði leygardagin upp til sin EM-dyst við at hyggja eftir Skotlandi og Føroyum. Skotska avsmyrjingin av føroyska liðnum gav ensku spælarunum íblástur, sigur liðformaðurin**

FÓTBÓLTUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*John Terry fegnast saman við liðfeløgunum um eitt av fimm málum, sum Ongland skoraði ímóti Andorra leygardagin*

*Mynd: Scanpix*

Ongland fekk flúgvandi byrjan í EM-undankappingini, tá ið teir leygardagin vunnu 5-0 á Andorra á heimavølli.

Sambært liðformanninum John Terry gav føroyska stórtapið Glasgow ensku spælarunum luft undir veingirnar.

John Terry sigur við The Sun, at enska liðið hugdi at dystinum millum Skotland og Føroyar, áðrenn teir skuldu á vøllin til EM-dystin ímóti Andorra.

– Vit hugdu at skotska dystinum áðrenn okkara dystur byrjaði, og Skotland var frammanfyri við fimm málum, tá hálvleikur var. Eg vil ikki siga, at hetta legði trýst á okkum at gera tað sama móti Andorra. Men vit vistu, at hetta var tað, ið øll væntaðu av okkum, sigur John Terry og heldur fram:

– Andorra er ivaleyst umleið á sama støði sum Føroyra, og skotarnir høvdu víst, hvat kann henda, um tú fært rætt fatur á hesum liðunum frá byrjanini av dystinum. Tað riggar ikki altíð, men hesaferð gjørdi tað, og vit gjørdu alt, ið nakar kundi krevja av okkum.

Liðskiparin avdúkaði eisini, at hetta var nógv lættasti dysturin, ið hann hevði spælt fyri Ongland.

## Vit mugu víðari

**– Hetta var forferdiligt, segði føroyski málmaðurin eftir dystin leygardagin. Hann legði tó dent á, at liðið má royna at koma víðari**

SKOTLAND-FØROYAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Jákup Mikkelsen hevur seinastu tveir landsdystirnar latið 12 mál farið ígjøgnum, og tað munnu verða nógv ár síðani, at so nógv mál eru farin ígjøgnum hjá føroyska landsliðnum í tveimum fylgjandi dystum.

– Hetta var forferdiligt. Dysturin var eitt stórt vónbrot. Teir høvdu lætt við at spæla í fyrra hálvleiki, og teir fingu nøkur løtt mál, segði ein týðuliga vónbrotin Jákup Mikkelsen eftir dystin.

Hann hevði hondina á fimm av bóltunum, sum fóru í málið, og hevði hann verið hepnari, kundi hann ivaleyst havt forðað fyri onkrum av málunum.

– Mítt avrik var skuffandi. Eg kundi havt tikið bæði straffini, men eg veit ikki, um eg kundi gjørt nakað við hini málini.

- Nú hava vit tapt 6-0 í tveimum fylgjandi dystum, og tað er alt ov nógv. Tað man vera langt síðani, at landsliðið hevur fingið tvær slíkar avhølvingar á rað, segði Jákup Mikkelsen.

Hann legði dent á, at fyri landsliðið ræður tað bara um at koma víðari og gera tað betur næstu ferð.

– Vit kunnu ikki gera nakað við tað, sum er farið. Vit mugu bara koma víðari. Málmunurin nýtast vit ikki at hugsa so nógv um, men vit skulu bara royna at fáa nøkur góð úrslit, segði hann.

– Fólkið á landsliðnum er framvegis nóg gott til, at vit kundu fingið okkurt gott úrslit. Vit eiga ikki at blíva so avhølvaðir, sum vit blivu bæði í dag og seinast.

# Oddaliðið sendir venjararnar heim

**Tríggir av fýra uppsøgdum venjarum hava fingið sekkin, eftir at teir hava dystast við oddaliðið EB/Streym**

UPPSAGNIR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*









Higartil í ár eru fýra venjarar í Formuladeildini annaðhvørt koyrdur úr starvinum ella uppsagdir. Tað er onki óvanligt í, at høvd rulla, tá úrslitini ikki eru til vildar, og hetta hava teir fýra Jóannes Jakobsen, Ole Andersen, Petur Simonsen og nú eisini Trygvi Mortensen merkt at egnum kroppi, tá felag teirra hevur valt at siga sáttmálan við teir upp.

Merkisvert er tó, at tríggir av hesum fýra venjarum hava fingið sekkin, eftir at teir hava dystast við oddaliðið EB/Streym.

Tað var í døgunum eftir 8-2 stórtapið móti oddaliðnum EB/Streymi, at Jóannes Jakobsen varð koyrdur. Síðani fekk Ole Andersen sekkin, men var tað eftir 4-0 tapið fyri Skála. So fekk Petur Simonsen durafjórðingin og var tað eftir, at EB/Streymur og ÍF spældu javnt í avblásta dystinum á Mølini.

Í morgun boðar NSÍ frá, at Trygvi Mortensen ikki er venjari hjá teirra besta liði longur, og seinast NSÍ spældi ein dyst taptu teir 4-1 fyri oddaliðnum EB/Streymi.

Aftrat tí, kemur frákoyringin av Heine Fernandez sum venjara hjá HB í fjør, og tað var somuleiðis eftir tap fyri EB/Streymi, sum tó ikki var oddaliðið tá.